VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, um kvøldið upp í hvassan vind. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum 1 og 4 stig.



Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.

Føroyskt poppsavn ávegis

Tann 1. November kemur fløga út, ið ber heitið Popp List. Hetta er savn av góðum føroyskum popptónleiki og ætlanin er, at hetta er fyrsta fløgan í eini rød av savnsfløgum

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Vanligt er, at tey kendastu løgini innan popp, rokk, dance ella annan tónleik koma á savnsfløgum, ið eru fløgurøðir.

Í Føroyum eru vit ikki so von við hetta, hóast onkur savnsfløga er komin við føroyskum løgum, men eingin savnsrød er at finna. Men nú er ein slík ávegis og ætlanin er, at hetta er fyrsta fløgen í eini rød. Ætlanin er at savna kendastu løgini innan popptónleik, ið koma út, og so er eisini gjørligt at gera savn innan ymsar tónlistagreinar, t.d. gospel og annað.

Verkætlanin hevur heitið Popp List og tað eru 3'arin og Tutl, ið samstarva um ætlanina. Fløgan, sum hevur kend nøvn innan føroyskan popptónleik á lepanum, verður á handilshillunum 1. November og ætlandi verður skipað fyri tiltaki í samband við útgávuna tann 31. oktober, frættist úr 3'aranum.

Við á fyrstu Popp List fløguni eru Lena, taxi, Clickhaze, Brandur Enni, All That Rain, Malan Thomsen, I Am, Mark No Limits, Enekk, Dagfinn & Impulz, Kular Røtur, Frændur, Tangz, Týr, Millum Frændur, Haldurs Café og Stanley Samuelsen.



Hitalagið kring knøttin

Illulisat	2
Nuuk	3
Qaqortoq	9
Ammassalik	3
Saint John's	5
Halifax	8
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	7
Lerwick	7
Aberdeen	8
London	10
Tromsø	÷1
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	3
Keypmannah.	6
Helsinki	÷1
Moskva	4
Berlin	15
Warzawa	13
Kiev	9
Bukarest	9
Paris	16
Madrid	20
Róm	21
Malorca	23
Athen	23
Malta	23
Tunis	29
Beijing	22
New Dehli	30
Bangkok	29
Jakarta	34
Sydney	18
New York	15
Miami	26
Los Angeles	16
Meksikobýur	22
Panama	29
La Paz	6
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	20

LUFTTRÝSTIÐ



Millum eitt hátrýst, 1041 hPa yvir Grønlandi og eitt lágtrýst, 988 hPa yvir Danmark rekur køld luft av landnyrðingi móti Føroyum.

Hátrýstið yvir Grønlandi mennist, so tann kaldi luftstreymurin móti Føroyum heldur fram.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 15/10 kl. 06⁰⁰– 16/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,9°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 15/10 kl. 06⁰⁰– 16/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 27,1 mm

JUNIOR
BUSS TAXA
KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

6. okt.: Mánin næstur jørðini
13. okt.: Fyrra kvarter
20. okt.: Mánin longst frá jørðini
21. okt.: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
18. okt.	05.34	17.53	04.34	16.53	04.49	17.08	07.34	19.53	08.34	20.53	03.49	16.08	02.49	15.08	05.49	18.08	06.49	19.08	05.19	17.38	06.34	18.53
19. okt.	06.13	18.33	05.13	17.33	05.28	17.48	08.13	20.33	09.13	21.33	04.28	16.48	03.28	15.48	06.28	18.48	07.28	19.48	05.58	18.18	07.13	19.33
20. okt.	06.53	19.10	05.53	18.10	06.08	18.25	08.53	21.10	09.53	22.10	05.08	17.25	04.08	16.25	07.08	19.25	08.08	20.25	06.38	18.55	07.53	20.10
21. okt.	07.27	19.44	06.27	18.44	06.42	18.59	09.27	21.44	10.27	22.44	05.42	17.59	04.42	16.59	07.42	19.59	08.42	20.59	07.12	19.29	08.27	20.44

5 707265 100050 >